# Skipaeftirlitið

FAROESE MARITIME AUTHORITY

*MINISTRY OF FISHERY AND MAITIME AFFAIRS*

# Skipaeftirlitisfólk

## Skipaeftirlitið søkir eftir einum skipaeftirlitsfólki

Starvið er í høvuðsheitum skrivstovuarbeiðið/málsviðgerð og inniber m.a. hesar uppgávur:

- Umsiting og eftirlit við undirveitarum
- klassaeftirlit
- málsviðgerð og uppfylging av sýnum
- luttaka í tvørgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv:**

- Til starvið krevst viðkomandi utbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring), ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið, Postsmoga 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Dagrøktarin hevur vanliga 4-5 børn í sínum egna heimi. Hetta gevur tí einstaka barninum tryggar karmar í heimligum umhvørvi. Til ber at laga gerandisdagin eftir tí tørvi, sum einstaka barnið hevur.

## Dagrøktarar til Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir dagrøktarum.

**Vit bjóða**
eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tú fært hollan stuðul frá kommunalu skipanini. Fyri at kunna hava børn í dagrøkt er neyðugt, at hølini har børnini verða ansað eru hóskandi. Møguleikar skulu vera til uttandura virksemi.

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Marjun Midjord, dagrøktarleiðara, tlf. 302010, lokal 1089, teldupost: marjun@torshavn.fo ella við at fara inn á heimasíðuna www.torshavn.fo/leysstorv.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu sendast Dagrøktarskipanini, postboks 32, FO-110 Tórshavn.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4018,** Sp/f 1.8.2005, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Eyðun Andrias Jespersen, Bóndaheygur 11, 100 Tórshavn
**Innkomin sum likvidator:** Annfinn V. Hansen, adv., Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn
**Átekning:** Felagið er tann 05.01.2006 farið í sjálvbodna likvidatión

*Skráseting Føroya*
*tann 12. januar 2006*

*Kristin Balle*



# MISSIÓNSVIKA
## 17.–22. JANUAR 2006

**Týsdagin 17. januar**
Kl. 20.00 Uni Næs talar
Meinigheitskórið úr Havn syngur

**Mikudagin 18. januar**
Kl. 20.00 Andreas Andreassen talar
Glyvrahórið syngur

**Hósdagin 19. januar**
Kl. 20.00 Frits Thomsen talar
KFUM&K kórið í Klaksvík syngur

**Fríggjadagin 20. januar**
Kl. 20.00 Reimund Langgaard talar
Kórið VOX syngur

**Leygardagin 21. januar**
Kl. 19.00 Alfred Petersen talar
Kór úr Gøtu syngur

**Sunnudagin 22. januar**
Kl. 12.00 Gudstænasta v/altargongd
Kl. 14.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18.00 Bergur D. Joensen talar
Húsakórið syngur

*Verið hjartaliga vælkomin á missiónsviku*
*í Leirvíkar Missiónshúsi*

- Bønarmøti verður hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtini byrja
- Møguleiki verður fyri forbøn og samtalu.
- Drekka verður hvørt kvøld eftir møtini
- Fríggjakvøldið verður innsavnan til landsarbeiðið hjá HM og Sunnukvøldið til Missiónshúsið

## Mentamálaráðið

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tel. 35 50 50
Faks 35 50 55
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

### Mentamálaráðið søkir eftir fulltrúa

Eitt starv sum fulltrúi er leyst at søkja. Talan er um eitt sera áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv, sum fevnir um ymiskar uppgávur í sambandi við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni.

Umsóknarfreistin er 23. januar 2006 kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu ráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv)

Mentamálaráðið

Lesið Sosialin - so eru tit við